# 3,75 milliónir í handskarúminum

Í seks vikur vistu eini hjún á Norðursælandi als ikki av, at tey vóru ein av fýra lotto-vinnarum. Tá lotto-tølini vórðu drigin 9. mai, vóru fýra seðlar, sum vunnu 3.750.000 krónur hvør. Tríggir vinnarar vendu sær alt fyri eitt til Danske Spil, men ikki fyrr enn nú er fjórði vinnarin komin undan kavi. Talan var um eini hjún á Norðursælandi, sum als ikki vistu av, at tey høvdu vunnið. - Eg hevði lagt kvittanirnar í handskarúmið í bilinum. Eg sá tær aftur ein dagin, tá eg skuldi keypa inn, og so helt eg, at eg líka skuldi kanna eftir, um tær høvdu vunnið, sigur kvinnan, sum ikki vil hava sítt navn fram í miðlunum, við Danske Spil. Hon upplýsir tó, at hon og maðurin eru í 30'unum og hava tvey børn.



# Kreppan er av í heyst

Greinarar hjá Danske Bank meta, at seinna hálvár í ár verður búskaparvøkstur í Danmark.Tað skrivar heimasíðan, epn.dk. - Fallið í nýtstluni og útflutninginum er at kalla burtur, og spakuliga hóma vit positivar tendensir verður sagt í frágreiðing, sum heimasíðan hevur fingið hendur á. Samanlagt verður talan helst um eina búskaparminking upp á 3,5% í ár í mun til 2008, men hetta stavar fyrst og fremst frá búskaparfallinum í fjør heyst og í vár. Víðari skriva greinararnir, at búskaparvøksturin í 2010 helst verður um 0,8%, og at árinini av fíggjarligu átøkunum veruliga koma til sjóndar í 2011.

# Tillaga barnaskúlar í Sundalagnum

**Kommunustýrið í Sunda Kommunu arbeiðir nú við at samskipa alt skúlaøkið. Endamálið er ikki at niðurleggja skúlar, men at lyfta skúlaskapin upp á hægri støði og at fáa eina betri undirvísing, sigur borgarstjórin**

SKÚLASKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Í løtuni eru útlit fyri, at Eiðis og Sunda kommunur fara at víðka samstarvið, sum hevur verið um framhaldsdeildir frá 70árunum, til eisini at umfata barnaskúlar*

*Tilgjørd mynd*

- Endamálið er ikki at leggja skúlar niður. Endamálið er at fáa eina betri undirvísing.

Tað er orsøkin til at tey í Sunda kommunu hava tikið stig til at samskipa allan skúlaskapin í økinum, sigur Kim Durhuus, borgarstjóri.

Í løtuni eru seks skúlar í kommununi umframt framhaldsdeildin í Felagsskúlanum á Oyrarbakka, har næmingar av Eiði eisini ganga.

Borgarstjórin sigur, at mentamálaráðið hevur lagt upp til finna eitt royndarøki, har skúlaskapurin verður savnaður í størri eindir fyri at fáa betri skúlar og betri undirvísing.

- Í tí sambandi hava vit so havt følara frammi fyri at vita um mentamálaráðið hevur áhuga fyri at gera um at brúka Sunda kommunu sum royndarøki.

Og tað hevur mentamálaráðið áhuga í.

- Vit vilja fegin fáa sum mest burtur úr teimum krónum, vit brúka upp á skúlaskapin í Kommununi og samstundis eru vit sannførd um, at samskipa vit skúlaskapin í størri eindir, fer tað at geva eina betri undirvísing, sigur Kim Durhuus.

Tað er okkara fremsta raðfesting, leggur hann afturat.

Hann leggur afturat, at tað snýr seg eisini um at leggja skúlaskapin so til rættis, at tað eggjar lærarum til at søkja og sum støðan er nú, er tað tórført hjá teimum smáu bygdaskúlunum at fáa lærarar.

Hann staðfestir eisini, at mentamálaráðið hevur gjørt vart við, at framyvir skulu vit ikki vænta, at játtanin til fólkaskúlan fer at veksa og at tað tí er neyðugt at gagnnýta játtanina sum best.

### Eitt skúlaøki

Í hesum sambandi verður lagt upp til at gera alla Sunda Kommunu og Eiði til eitt felags skúlaøki og at samskipa skúlaskapin í økinum.

Verður Felagsskúlin á Oyrarbakka taldur við, eru útvið 350 skúlanæmngar í økinum.

Á Eiði hava tey ikki tikið støðu til málið enn, men tað fara tey væntandi at gera beint eftir summarfrítíðina.

- Men verður Eiði ikki við, ætla vit kortini at arbeiða víðari við ætlanini, men so verður tað bara Sunda kommuna, sum verður skipað í eitt felags skúlaøki, sigur Borgarstjórin.

Kortini ásannar Kim Durhuus, at tað skerst ikki burtur, at verður skúlaskapurin savnaður í størri eindir, verða tað eisini færri skúlar og sostatt eisini færri skúlabygningar hjá kommununi at halda.

- Men tað skuldi so aftur gjørt kommununa føra fyri at gagnnýtt játtanina til skúlarnar betri, leggur hann afturat.

## Neystabø fegnast

Helena Dam á Neystabø fegnast, at Sunda og Eiðis kommunur leggja upp til samstarv um skúlaøkini.

- Eg havi verið á nøkrum fundum við kommunurnar, og tað ljóðar positivt hjá teimum. Hinvegin havi eg onki endaligt uppskot hoyrt, men tað er gleðiligt, at arbeitt verður við størri skúlaøkjum, sigur landsstýriskvinnan.

Hon leggur afturat, at tað bara verður ein fyrimunur hjá teimum, sum leggja saman í dag, tí skuldu tvungnar samanleggingar verðið, so verða færri møguleikar hjá hvørjum øki.

- Málið er sjálvandi, at hava ein sterkari fólkaskúla, sum klárar seg betri fakliga. Hinvegin kann peningur eisini sparast, so tað eru avgjørdir fyrimunir, staðfestir hon.

**-eij**

# Eiði er við

**Tom Joensen, formaður í trivnaðarnevndini hjá Eiðis kommunu, staðfestir, at Eiðis kommuna er opin fyri møguleikanum, at skipa Sundalagið og Eiði í eitt skúlaøki**

SKÚLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Eiðis kommuna er opin fyri einum dialogi um skúlarnar í økinum, men tað skal ikki bara vera Sunda kommuna, ið er á fundunum.

- Sunda kommuna hevur eitt uppskot at hava tveir skúlar í øllum økinum. Soleiðis at skúlarnir á Oyrarbakka og Eiðis skúli eru teir, ið verða nýttir. Somuleiðis hugsa tey at hava barnaskúlan har suðuri og eldru børnini her norðuri. Hetta vilja vit síggja burtur frá, tí tá veruligu fundirnir byrja, skal pappírið vera blankt, sigur Tom Joensen, formaður í trivnaðarnevndini í Eiðis kommunu.

Rólant Poulsen, borgarstjóri í Eiðis kommunu, tekur undir við hesum.

- Tekur tú børnini úr eini bygd, so avtoftar tú hana. Og tað vilja vit sjálvandi ikki, sigur hann.

Kim Durhuus, borgarstjóri í Sunda kommunu, greiðir somuleiðis frá, at pappírið skal vera tømt, tá fyrsti fundurin í nevndini fyri skúlaøkið verður.

### Smáu børnini

Limirnir í Sunda- og Eiðis kommunu, eru eisini rørandi samdir um, at tað verða smæstu børnini, sum verða økið, ið er størsta avbjóðingin í tilgongdini til eitt skúlaøki á Eiði og í Sundalagnum.

- Vit kunnu koma í støðuna, at børnini frá fyrsta flokki fara av bygdini í skúla, og tað vilja vit treyðugt, sigur Rólant Poulsen.

Kim Durhuus dugir eisini at síggja hendan trupulleikan.

- Tað verður torført við smæstu børnunum. Tað verður ein spurningur, hvat foreldur og so framvegis vilja gera við smæstu børnunum, sigur borgarstjórin í Sunda kommunu.

### Hini mangla pláss

Kommunustýrislimirnir í Eiðis kommunu, leggja eisini stóran dent á, at Eiðis kommuna ikki hevur nakran trupulleika við verandi skúlaskipan, men at tað er Sunda kommuna, sum ikki hevur nóg mikið av plássi í teirra størru skúlum.

- Vit hava eitt frálíkt samstarv við felagsskúlanum, og hava nóg mikið av plássi í Eiðis skúla. Men sjálvandi vilja vit vera við, um tað hjálpir teimum og gevur okkum ein betri skúla, sigur Tom Joensen.

Enn er tó onki avgjørt, hvussu skúlarnir skulu skipast, og frá augustmánaði verða eftir øllum at døma fundir, um hvussu verður við ætlanini við víðkaða samstarvinum um skúlar í Sundalagnum og Eiði.